Steffan Klein Poulsen
Jenis av Rana
løgtingsmenn

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um at verja ófødda barnið

§ 1. Barn, hvørs mamma annaðhvørt býr í Føroyum, tá barnið verður gitið, ella flytir til Føroya í viðgongutíðini, hevur rætt til lív.

§ 2. Kvinna, sum er við barn, og foreldur skulu hava í boði ráðgeving og stuðulssamrøður, sum fevna um møguleikarnar fyri viðgerð, hjálp og vegleiðing í viðgongutíðini og eftir, at barnið er føtt.

Stk. 2. Landsstýrisfólkið skipar eina hjálpareind, sum hevur sum uppgávu at útgreina tørvin hjá kvinnuni ella foreldrunum og knýta samband við stovnar og serkøn, ið kunnu veita neyðuga hjálp, til dømis fíggjarliga, læknaliga, sálarliga, andaliga og hjálp til burturættleiðing.

§ 3. Læknin, sum staðfestir gitnaðin, hevur skyldu til at tryggja sær, at kvinnan er kunnað um møguleikan fyri ráðgeving og stuðulssamrøðum sambært § 2.

Gildiskoma

§ 4. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2024, og samstundis fer úr gildi lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Talið av fosturtøkum runt heimin táttar í dag í fimmti milliónir árliga. Av hesum verða tær tríati framdar í Føroyum. Hetta svarar til væl meira enn ein skúlaflokk árliga. Onkur vil væl siga, at tal føroyinga er lágt sammett við onnur lond, og rætt er tað. Men tann veruleikin er eingin umbering fyri at fremja hesar, tí 30 fosturtøkur eru 30 ov nógvar.

Eingin hevur rætt at taka sær vald at avgera, hvør skal sleppa at liva, hvørki í Føroyum ella aðrastaðni í heiminum. Øll eiga íbornan rættin til lív, ein rætt, sum einki menniskja eigur at kunna gera seg inn á. Vónandi fáa vit í einari komandi føroyskari grundlóg staðfest, at hesin rættur til lív er rættur ófødda barnsins. Men til tað hendir er neyðugt, nú politiskar kreftir royna at geva leyst og vóna at fáa lagt uppskot fyri Løgtingið um sokallaða fría fosturtøku, at tryggja barnið við einum uppskoti, sum gevur tí lógarfestan rætt til Lív. Rætt til sama lívið sum tú og eg, sum liva, einaferð fingu frá foreldrum okkara.

At kalla nakað fría fosturtøku er av sonnum ein mótsøgn. Av øllum hugsandi aktørum í fosturtøkumálinum, mammu, pápa, politikarum, heilsustarvsfólkum og annars øllum, sum meta seg at hava rætt til at hava eina hugsan um hetta málið, er og verður til allar tíðir tað ófødda barnið høvuðspersónurin. Tað er lív tess, flestu hesi halda seg hava rætt til at hava eina meining um, nøkur halda seg hava rætt til at seta prísmerki á, og onnur halda seg kunna gera enda á.

Men frá høvuðspersóninum sjálvum, henni ella honum, sum veksur í lívi móður sínar, verður frælsið tikið. Hjá henni og honum er fosturtøkan alt annað enn frí, tí onnur taka sær frælsi til at ráða yvir barninum. Hesi, sum njóta frælsið, sum foreldur teirra góvu teimum at gerast frælsir føroyskir borgarar, taka frælsið frá høvuðspersóninum í fosturtøkumálinum og vága sær at kalla fosturtøkuna frælsa. At kvetta lívsstreingin hjá einum øðrum av er tað mótsatta av frælsi, tað er at fremja tað ultimativa ófrælsið.

Lívmóðirin, sum er ætlað at vera tryggasta og friðsamasta stað heimsins, verður, fyri at endurgeva mætu kvinnuna, nobelprísmóttakaran móður Teresu, ein krígsvøllur. Við kemiskum evnum, heilivági, ið voldir deyða, og um hetta ikki hjálpir, so við instrumentum, sum skera, skræða, skava og súgva, verður friðurin brotin, og tryggi heimstaður barnsins verður ein vígvøllur, har úrslitið er givið frammanundan. Tann sterki, við ella uttan lógini í sínari hond, vinnur. Óseka barnið verður týnt.

Hetta má steðgast heldur enn at staðfestast.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi fosturtøkulóg, lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, eigur ábyrgdina av, at út móti 1500 føroyingar, seinastu tríati árini, ikki eru bjóðaðir vælkomnir til lívið. 1500 ósek smábørn fingu ikki ta móttøku, sum foreldur okkara góvu okkum, tann dagin vit fingu atgongd til lívið. Hetta er á leið sama starvsfólkatalið, sum í dag verður mett at mangla á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Talan er um eina danska lóg, sum í 1956 varð sett í gildi í Føroyum, og sum síðani hevur verið brúkt sum grundarlag fyri fosturtøkupolitikki Føroya og harvið fosturtøkutíttleika landsins.

Ein avgerandi fyritreyt fyri galdandi fosturtøkulóg, tá hendan var í gildi í Danmark, var holl ráðgeving frá mødrehjælpsinstitutionen, sum í Danmark virkaði í statsligum regi til 1973 og í 1983 varð endurstovnað í privatum regi. Slík ráðgeving fekst ongantíð at virka í Føroyum. Ein

fyribilsskipan varð sett í verk soleiðis, at læknin, sum fremur fosturtøkuna, og annar lækni í Føroyum koma í staðin fyri mødrehjælpsinstitutionen.

Tíverri stendur henda fyribilsskipan enn við. Roynt hevur verið at fáa lóg um Mødrehjælp ella líknandi ráðgeving setta í verk í Føroyum fyri á tann hátt at minka um fosturtøkutalið, men undirtøka hevur ikki verið fyri hesum.

Tó at galdandi fosturtøkulóg ikki nevnir sosialar orsakir, er breið semja um, at so gott sum allar tær fosturtøkur, ið eru gjørdar í Føroyum, byggja á hesa indikatión. Tá spurt verður um, hvussu sosial orsøk kann verjast, verður víst til orðingina í § 1, stk. 1, nr. 1, har orsøkin til at geva loyvi at taka eitt barn ljóðar soleiðis:

"*Når svangerskabets afbrydelse er nødvendig for at afværge alvorlig fare for kvindens liv eller helbred. Ved bedømmelsen af denne fare skal der på grundlag af en vurdering af samtlige omstændigheder, herunder de forhold, hvorunder kvinden må leve, tages hensyn ikke alene til fysisk eller psykisk sygdom, men også til tilstedeværende eller truende fysiske eller psykiske svækkelsestilstande.*"

Her finnur tú ikki orðingina "sosialar orsakir", men hesa: "*Ved bedømmelsen af denne fare skal der på grundlag af en vurdering af samtlige omstændigheder, herunder de forhold, hvorunder kvinden må leve".* Hendan orðingin vísir til tað sosiala og er og verður brúkt sum grundarlag undir øllum teimum mongu sokallaðu sosialu fosturtøkunum, sum eru vorðnar framdar, síðani lógin varð sett í gildi í 1956.

Sosialir trupulleikar mugu ongantíð ganga út yvir veikar samfelagsborgarar, sum í hesum føri eru ófødda børnini. Missa vit ábyrgdarkensluna og umsorganina fyri neyðstøddum foreldrum og óføddu teirra, kunnu Føroyar flokkast millum fátækastu av øllum heimsins tjóðum. Heldur eiga vit, tá treingir um hjá okkara veiku, at taka hendur saman um hesi og sum tjóð veita bæði børnum, mammum og foreldrum alla ta hjálp, ið krevst, tað veri seg fíggjarliga, bústaðarliga, læknaliga og hjálp til ættleiðing.

Sum eitt av ríkastu londum í heiminum kunnu Føroyar ikki nokta óføddum rættin til lív og grundgeva við sosialum orsøkum. Gera vit tað, raka orðini hjá móður Teresu okkum, tá hon sigur: "De nationer, som tillater fosterdrap, er de allerfattigeste, og den største trussel mod freden i dag, er det ufødte barnets skrig".

1.3 Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er:

- At endurskapa virðing og tign fyri ófødda barninum.
- At tryggja alternativ til fosturtøku.
- At lógarfesta rættin til lív heilt frá gitnaðarløtuni.
- At tryggja kvinnuni og foreldrunum, at barnið verður virðiliga viðfarið bæði áðrenn og eftir føðing.
- At tryggja kvinnuni og foreldrunum virðiliga viðferð og neyðugu hjálpina bæði áðrenn og eftir barnsburð.

Føroyska samfelagið hevur skyldu til at veita kvinnu, sum eru við barn, og komandi barni hennara, allan tann stuðul, lætta og hjálp, herundir fíggjarligan, sosialan og heilsuligan, sum krevst, fyri at viðgongutíðin og barnaárini verða løtt, trygg og virðilig.

Uppskotið staðfestir skyldu samfelagsins at veita neyðuga hjálp at beina burtur forðingar, ið kunnu koma fyri í viðgongutíðini og barnaárum. Hesar forðingar kunnu vera fíggjarligar, bústaðarligar, heilsuligar, arvaligar, sosialar, bráðkomnar eins væl og kroniskar forðingar. Ella sum galdandi fosturtøkulóg orðar nakrar av hesum orsøkum:

1. Når svangerskabets afbrydelse er nødvendig for at afværge alvorlig fare for kvindens liv eller helbred. Ved bedømmelsen af denne fare skal der på grundlag af en vurdering af samtlige omstændigheder, herunder de forhold, hvorunder kvinden må leve, tages hensyn ikke alene til fysisk eller psykisk sygdom, men også til tilstedeværende eller truende fysiske eller psykiske svækkelsestilstande.

2. Når kvinden er blevet besvangret under sådanne omstændigheder, som omhandles i Borgerlig Straffelov af 15. april 1930 § 210 eller § 210, jfr. § 212, samt når svangerskabet skyldes krænkelse af kvindens kønsfrihed under sådanne omstændigheder, der omhandles i straffelovens §§ 216-223 eller disse paragraffer sammenholdt med § 224.

3. Når der er nærliggende fare for, at barnet på grund af arvelige anlæg eller på grund af beskadigelser eller sygdom, pådraget i fosterlivet, vil blive lidende af sindssygdom, åndssvaghed, andre svære mentale forstyrrelser, epilepsi eller alvorlig og uhelbredelig abnormitet eller legemlig sygdom.

4. Når i ganske særlige tilfælde alvorlige fysiske og psykiske defekter eller andre lægeligt begrundede forhold medfører, at kvinden skønnes uegnet til at tage vare på sit barn.

Ferð eftir ferð hava tingfólk úr Miðflokkinum lagt uppskot fyri Løgtingið og sett fyrispurningar til landsstýrisfólk, við tí endamáli at minka um og vónandi steðga fosturtøkunum, ið verða framdar í heilsuverki okkara. Hetta hevur higartil verið úrslitaleyst. Tað er óskiljandi fyri okkum, at tað heilsuverkið, sum dagliga verjir lív, uttan at himprast brúkar tíð, orku og pening, sum átti at verið brúkt rættari, til at steðga lívi teirra, sum eru mest sárbar og áttu at fingið bestu verjuna. Her skal eisini havast í huga, at kanningar og enntá videoupptøkur greitt vísa, hvussu fostrið verjir seg og heldur undan, tá roynt verður at tvingsilsflyta tað úr trygga bústaði tess.

Allar royndir at fáa politiska meirilutan at skifta kós hava higartil tíverri verið úrslitaleysar. Tó hevur áhaldandi stríðið, sum eldsálir í millum annað Kristiliga Fólkaflokkinum, Pro Vita og í kirkjum og samkomum hava staðið á odda fyri, havt tað positiva úrslit, at talið av fosturtøkum hevur ligið væl lægri enn í øðrum londum og er javnt lækkað seinastu tríati árini. Men í miðal tríati fosturtøkur árliga er ov høgt.

Samtykta uppskotið fer at hava við sær, at Føroyar liva upp til krøvini í Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá børnum" (Barnarættindasáttmálanum), har tað í præamblinum verður væntað av sáttmálalondunum, at hesi taka atlit til at: "barnið, vegna likamligan og sálarligan óbúnað, hevur tørv á serstakari umsorgan og verju, herundir hóskandi juridiskari verju, bæði áðrenn og aftaná føðing". Sáttmálin hevur verið í gildi fyri Føroyar síðani 1993.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Tá fosturtøku umræður eru tríggir partar. Barnið, hvørs lív er í váða, mamman og pápin. Teirra ynski kunnu vera ymisk, alt eftir um tey eru samd ella ikki. Grundgevingarnar hjá foreldrunum

kunnu vera fleiri og ymiskar, men so gott sum altíð er talan um slíkar, sum kunnu loysast, um tíð verður tikin til at finna veruligu orsøkina.

Í slíkum støðum má støða takast til, um og hvørs áhugamál verða tikin framum. Í hesum uppskotinum verður fyrst og fremst tikið atlit til høvuðspersónin, hann, hvørs lív er í váða. Viðvíkjandi barninum eru jú bert tveir valmøguleikar, antin at veita foreldrunum neyðuga stuðulin at bera tað í heim, ella at geva loyvi til at slíta lívstreingin og volda deyða tess.

Trupulleikar foreldranna verða ongantíð loystir við at taka lív barnsins. Tvørturímóti.

Skuldi tann støða tikið seg upp, og tað hendir, tó sera sjáldan í okkara framkomnu heilsuverkum, at lív stendur móti lívi, so er hetta ein heilsuligur spurningur, sum má loysast sum slíkur. Tað vil siga, at tá verða tað mamman, pápin ella næstu avvarðandi, sum eftir tilmæli frá læknum velja ta loysn, sum tryggjar lív.

Uppskotið leggur upp til at finna veruligu orsøkina og loysa hesa, heldur enn at skapa nýggjar og mangan álvarsligar avleiðingar, bæði likamligar og sálarligar, við at enda spírandi barnalívið.

Her kemur hjálpareindin til hjálpar. Endamálið við henni er at verða tøk við hjálp til ta kvinnu ella familju, ið er so fyri, at tey síggja ein nýggjan barnsburð at vera ein trupulleika, sum tey ikki megna. Eindin skal veita alla neyðuga hjálp til mammur, foreldur og barn, ið hava tørv á vegleiðing, ráðgeving og útgreining. Hjálpareindin skal veita neutrala og holla fakliga ráðgeving og hjálp til sjálvhjálp. Eisini skal hjálpareindin skipa fyri samrøðum við kvinnur, ið hava fingið framda fosturtøku, kunna um ættleiðing, tryggja frálæru í skúlum um virði ófødda barnsins, um fyribyrging og líknandi.

Fyri at geva hjálpareindini neyðugu raðfestingina, trygt kjølfesti og rúmd, er neyðugt við starvsfólkahópi, hvørs høvuðsuppgáva er at veita ráðgeving, hjálp og stuðul til nevnda málbólkin.

1.5 Ummæli

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Árligi kostnaðurin av uppskotinum er trupul at meta um frammanundan, men verður leysliga mettur til nakrar milliónir krónur árliga. Verður uppskotið samtykt, fer tað at bjarga lívum, og virði av hesum, eisini fíggjarliga, verður ómetaligt, tá hesi ár eftir ár gerast virknir samfelagsborgarar.

Hartil fer tann økti familjutrivnaðurin, sum hjálpin frá hjálpareindini hevur við sær, at síggjast aftur í samfelagnum beinanvegin.

Samanumtikið er trupult at finna rætta krónutalið, bæði her og nú og frameftir, men møguligar øktar útreiðslur fyrstu árini verða fíggjaðar á árligu løgtingsfíggjarlógunum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið fer at hava ávísar umsitingarligar avleiðingar við sær, við tað at hjálpareindin verður skipað og fer til verka.

Læknin, sum staðfestir gitnaðin, skal kunna um møguleikarnar fyri ráðgeving og stuðulssamrøðum og um hjálpareindina.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Ein grundleggjandi stuðulshjálp frá fyrsta viðgongudegi fer at hava við sær betri umstøður og trivnað hjá starvandi kvinnuni og húskinum gjøgnum alla burðartíðina, og við árunum fara tey børn, sum vildu endað sum fosturtøkur, at vaksa til, mennast og gerast partar av føroyska arbeiðsmarknaðinum. Á tann hátt fer tómrúmið eftir tær á leið 1500 fosturtøkurnar, sum seinastu tríati árini eru framdar í føroyska samfelagnum, ikki at upplivast aftur.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur, gjøgnum økta burðartalið, positivar avleiðingar fyri fólkatalið í væntandi øllum økjum av landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið endurskapar virðing og tign fyri ófødda barninum og lógarfestir rætt tess til lív heilt frá gitnaðarløtuni. Við at hjálpa og stuðla foreldum barnsins, tá trupulleikar av ymiskum slag tykjast køva gleðina um komandi barnið, ger tað fosturtøkur óneyðugar.

Við samfelagsins hjálp og stuðli verða mamman og foreldur bjargað frá teimum hjáárinum, likamligum og sálarligum, sum fosturtøkur í dag hava við sær.

Læknar og heilsustarvsfólk sum heild sleppa undan byrðuni at vera við til at enda lív. Hesi kunnu við gleði og friði geva seg yvir til tað starv, sum teirra kall og áhugi leiddi tey til; at viðgera sjúk, at linna um og at royna at bjarga lívum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Í Barnarættindasáttmálanum, bekendtgørelse nr. 6 af 16. januar 1992 om FN-konvention af 20. november 1989 om Barnets Rettigheder, sum er í gildi fyri Føroyar, verður í sjálvum præamblinum staðfest, at barnið hevur tørv á serstakari umsorgan og verju, herundir hóskandi juridiskari verju, bæði áðrenn og aftaná føðing.

§ 6, stk. 1 og 2 staðfesta, at luttakaralondini viðurkenna, at eitthvørt barn hevur ein natúrligan rætt til lív, og luttakaralondini skulu, so vítt møguligt, tryggja barsins yvirlivilsi og menning.

Við uppskotinum verður tryggjað, at omanfyri nevndu barnarættindi galda fyri føroysk børn frá gitnaði og inn í barnaár, og at foreldrini hava lógarfestan rætt til allan tann stuðul, sum er neyðugur, fyri at ásetingarnar í Barnarættindasáttmálnum verða fylgdar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið er ikki í andsøgn við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan (EMRS) ella Sáttmála Sameindu Tjóða hjá einstaklingum, ið bera brek. Heldur tvørturímóti, tí uppskotið stuðlar uppundir virði og javnrætt hins einstaka, eisini til lívið.

2.9. Markaforðingar

Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Uppskotið hevur ongar revsiásetingar ella ásetingar um størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld

Við árunum fer økta burðartalið av hava við sær bæði øktan skatt og økt avgjøld.

2.12. Gjøld.

Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld við sær.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Sambært § 4 hevur læknin, sum staðfestir gitnaðin, skyldu til at tryggja sær, at kvinnan er kunnað um møguleikan fyri ráðgeving, stuðli, viðgerð og stuðulssamrøðum sambært § 2. Læknin skal eisini kunna um hjálpareindina.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Sambært § 2 skipar landsstýrisfólkið eina hjálpareind.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

At samfelagið tryggjar øllum børnum rætt til lív og øllum kvinnum og foreldrum hjálp í sambandi við barnsburð fer at senda ótald jalig árin út í føroyska samfelagið og eisini styrkja mannarættindafatan føroyinga. Harumframt fara Føroyar sum frálíður at verða hægri mettar fyri virðing landsins fyri tí ófødda og foreldrum tess.

Kapittul 3

Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1. Greinin staðfestir, at lívið byrjar við gitnað og at øll, ið eru gitin, hava lógarfestan rætt til lívið.

Til § 2. Kvinnuni ella foreldrunum skal, bæði í viðgongutíðini og í barnaárunum, standa í boði kunnandi ráðgeving og stuðulssamrøður um tann samfelagsliga stuðulin, ið teimum er tryggjaður. Einstaklingar og foreldur kunnu venda sær beinleiðis til hjálpareindina.

Til § 2, stk. 2. Hjálpareindin skal knýta samband millum viðkomandi og avvarðandi stovnar, serkøn ella onnur, ið kunnu veita kvinnuni, foreldrunum og ófødda barni teirra neyðugu og tryggjaðu hjálpina, tað veri seg fíggjarliga, heilsuliga, sosiala, bústaðarliga, hjálp til ættleiðing ella aðra hjálp.

Av tí at talan er um at ráðgeva komandi foreldrum um teirra rættindi og veita hjálp í tí støðu, sum tey eru í, er tað natúrligt at skipa hjálpareindina í Almannaverkinum. Hjálpareindin eigur at verða mannað við persónum við løgfrøðiligari, fíggjarligari, sosialari, sálarfrøðiligari og læknafakligari útbúgving, umframt heilsufrøðingi og sálarhirða.

Til § 3. Tað er ikki ein skylda at venda sær til hjápareindina, men læknin, sum staðfestir gitnaðin, hevur skyldu til at tryggja sær, at kvinnan veit um hjálpareindina, og at hon veitir ráð, hjálp og stuðul í viðgongutíðini og í barnaárunum.

Til § 4. Galdandi fosturtøkulóg verður sett úr gildi samstundis, sum hendan løgtingslógin kemur í gildi tann 1. juli 2024.

Á Løgtingi, 7. mars 2024

Steffan Klein Poulsen Jenis av Rana